# Ítróttarhøll fær køk

Bygdaráðið í Eiðis kommunu hevur samtykt at byggja upp í vestara enda á ítróttarhøllini í bygdini. Tað hevur víst seg, at stórur tørvur hevur verið á einum køki, tá føðingardagar, brúdleyp og onnur tiltøk hava verið í høllini, og tí hevur bygdaráðið samtykt at byggja ein køk og eitt goymsluhøli upp í høllina. Á fíggjarætlanini í ár hevur bygdaráðið sett 500.000 krónur av til endamálið, skrivar Eiðis kommuna á sínari heimasíðu.



# Gongutúrur úr Kirkjubø

Sunnudagin fer Gongufelagið Tórshavn ein túr úr Kirkjubøi, umvegis Krossvatn og aftur til Havnar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10 og verður sagt, at túrurin er ein heldur lættur túrur. Túrurin varir í umleið 3 tímar.



*- Tað hevði verið tungligt, um man bara gekk heima. Tað er fínasta slag at egna her, sigur Karit Hansen*

*Tað er bara ein lítil løta, so hava hesir ungu knassarnir egnt ein stamp. Slíkar løtur vísir tað seg, sum um vit eldru bara hanga uppií teimum*

gággu og nakað av høggu-slokki eisini. Tað vísir seg, at gággan er kortini hon, sum roynist best.

### Koyrdur í skrell

Í sínum langa lívi hevur Karit roynt mangt og hvat innan vinnuligt virksemi, bæði heima og úti.

- Eg havi siglt úti í verðini, eg havi verið fiskari, arbeitt á smoltstøð – og nú eri eg so endaður her.

- Tað er næstan so, at man sleppur framat her í egningini, áðrenn man verður koyrdur í skrell. Tja, hetta er líkasum innspurturin, sigur hann við einum stórum brosi.

Hóast henda "veruleika" so er Karit sannførdur um, at egningin er eitt sera gott arbeiði fyri eldri fólk.

Tað er helst so sum Karit tekur til: - So sleppur ein undan at ganga heima og keða seg!

### Nógvur fiskur

Í egningarskúrinum hjá Olevinu eru teir vanliga einir 3-4 mans.

- Í dag eru vit so bara tríggir, men her koma ofta dreingir at egna sær nakrar stampar, sigur Karit.

Hjá teimum eldru er stuttligt at eygleiða, hvussu óførir og kvikhentir hesir ungu dreingirnir er at egna ein stampa.

- Tað er bara ein lítil løta, so hava hesir ungu knassarnir egnt ein stamp. Slíkar løtur vísir tað seg, sum um vit eldru bara hanga uppií teimum, sigur hann.

Honum dámar sera væl at arbeiða her, tí, sum hann sigur tað so gott: - Ein sær úrslit av tí, sum ein ger!

- Tað besta við tí er, tá teir fara til útrógvar við línu og koma aftur við nógvum fiski. Tá sær ein greitt, at her er talan um dugnaligar egnarar, sigur Karit.

Ein annar egnari er nú komin í skúrin at egna, og hann er púra samdur við honum í hesum: - Sum tú tó kanst siga tað!

### Ójøvn stødd

Fyrrapartin í gjár var Karit tíðliga á fótum eins og hann er vanur. Longu klokkan seks var hann á sínum plássi í egningarskúrinum.

- Eg plagi at fara til hús um fyratíðina, og tá man eg eisini hava egnt fyri meg, sigur hann.

Stamparnir eru ójavnir í longd, summir eru 300 favnar og aðrir 250 favnar. Vanliga megnar hann at egna 10 stampar uppá ein dag.

- Vit fáa sjálvandi meiri fyri teir longru stamparnar!



*Vanliga eru teir 3-4 mans í skúrinum. Petur Petersen av Viðareiði er ein teirra*

## FAKTA

**Olevina Klaksvík 716**

**Fyrrverandi nøvn:** Karin, 2003 (FD 92 – Toftir), Karin, 2000 (Klaksvík 716 – Klaksvík), Karin (FD 329), Christina (TN 372)
**Heimstaður:** Viðareiði
**Smíðistaður:** Esbjerg, Danmark í 1971
**Tilfar:** Eik/bók
**Stødd:** Longd 13,72 m; breidd 4,3 m og dýpd 1,74 metrar.
**Eigari:** sp/f Olevina, Viðareiði
**Útgerðarmaður:** Óli Sørensen, Viðareiði

## Prát og gestir

Tað er eitt serstakt tosingarlag og eitt serligt umhvørvi í einumhvørjum egningarskúri. Soleiðis er eisini í hesum skúrinum á havnarlagnum í Hvannasundi.

Karit dámar sera væl at koma higar í skúrin, tí her eru so nógvir áhugaverdir menn sum egna og teir fáa altíð eitt gott prát saman.

- Tað vísir seg eisini, at hetta er væl umtókt stað hjá øðrum monnum eisini. Her koma allatíðina menn ikki til eitt prát, sigur hann.

Nógvir teir eru sjálvir útróðrarmenn ella sjómenn, og vita tí altíð okkurt at siga, annaðhvørt talan so er um veður og vind ella fiskiskap.